**Páll á Reynatúgvu**
**løgtingsmaður**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 169/2018: Uppskot til samtyktar um at taka av føroysku fólkatingssessirnar**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið tekur undir við, at føroysku fólkatingssessirnir verða tiknir av, og heitir á landsstýrið um at fremja tingsins vilja mótvegis donsku stjórnini í hesum máli.

**Viðmerkingar:**
Føroyar eru nevndar tvær ferðir í donsku grundlógini viðvíkjandi fólkatingsvali. Í § 28, *Folketinget udgør een forsamling bestående af højst 179 medlemmer, hvoraf 2 medlemmer vælges på Færøerne og 2 i Grønland*, og í § 32, stk. 5. *Der kan ved lov gives særlige regler om færøske og grønlandske folketingsmandaters ikrafttræden og ophør.*

Mælt verður til at strika orðingarnar viðvíkjandi Føroyum og føroysku fólkatingsumboðanini í nevndu greinum.

Um tað einaferð í summum eygum, kann hava tænt sínum praktiska endamáli at hava tvinnar føroyskar fólkatingssessir á Fólkatingi, so er tann tørvurin útvatnaður fyri langari tíð síðani. Føroyskir myndugleikar hava heimtikið flestu felagsmálini, og eftir eru málini, sum beinleiðis knýta seg at skipanini av føroyska lýðveldinum.

Verandi føroysku fólkatingslimir hava tí fingið ein undarligan leiklut í donskum politikki. Eitt er, at teir kunnu gera av, hvør skal hava stjórnarvaldið í Danmark. Annað er, at teir kunnu lóggeva um viðurskifti fyri borgarar í einum øðrum landi enn okkara. Hettar er jú púra burturvið, og neyvan høvdu vit góðtikið, at ríkisumboðið hevði møguleikan at gera av, hvør stjórn skipar Føroyar, ella hvør lóggáva skal vera galdandi í Føroyum. Ongantíð ov skjótt mugu vit taka støðu til og virða, at lóggávurættin í Danmark, og á tingi dana, eiga danir, og ikki føroyingar.

Harafturat eru hesir sessir í stjórnarligum ongamannalandi, og kunnu í versta føri órógva ella undirgrava eina lógliga fólkavalda føroyska stjórn og hennara arbeiði mótvegis donsku stjórnini. Um vit hava tørv á umboðan í Danmørk, so er hettar ein uppgáva fyri føroysku sendistovuna, og ikki fyri tveir tilvildarligar fólkatingslimir, valdir í Føroyum.

Omaná stjórnarligu naggatódnina, so reika hesir fólkatingslimir, inn og út úr føroyskum politikki, og skapa órógv í politisku skipanini í Føroyum. Teir eru væl betri samsýntir enn føroysk tingfólk, og samanborið við tær 30.000 kr., sum løgtingsfólk fáa at arbeiða við um árið, fær ein fólkatingslimur væl omanfyri 1 mió. kr. um árið. Skipanin elur okkurt slag av ónøgd og mismuni,

sum ikki tænir nøkrum. Við føroysku fólkatingssessunum hava vit fingið eina yvirstætt millum føroyskar politikarar, sum hevur lítið annað at taka sær til, enn at selja seg sjálvan og sítt undirhald.

Fólkatingsvalini eru eisini órógvandi fyri føroyska samfelagið, og skapa valstríð í Løgtinginum, í úrtíð. Ringasta ávirkanin av fólkatingssessunum eftir uppskotssetarans tykki er kortini lokalpolitisku handlarnir seinnu árini um ítøkiligar ætlanir av ymiskum slagi. Minnir mest um kommunustýrispolitikk frá síni verstu síðu. Alt bert við eittans endamáli, at fremja møguleikan fyri afturvali hjá tí, sum handilin hevur gjørt.

Vit føroyingar eiga eitt av heimsins elstu tingum, Løgtingið. Sum frumbornir føroyingar fáa vit møguleikan at umboða hægstu fólkaræðisligu tignina í landinum, og eingin ivi eigur at vera um tað. Tað er her í okkara landi, at vit skulu stjórna, við okkara føroyska fólkaræði.

**Á Løgtingi, tann 7. mars 2019**

Páll á Reynatúgvu